# Big Brother Sissal er við barn

**Føroyska Sissal skal verða mamma at fyrsta Big Brother barninum í heiminum. Í drúgvari samrøðu við BT í dag, sigur Sissal, at hon varð upp á vegin fyri seks vikum síðan. Sissal er sett til at eiga 22.juli komandi summar**

BIG BROTHER
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



Fyri nøkrum vikum síðan gingu leysatíðindi um, at føroyski luttakarin í Big Brother, Sissal Ólafsdóttir Frisdahl, var blivin upp á vegin inni í Big Brother húsinum. Hesi leysatíðindi er nú gjørd til veruleika. Føroyski Big Brother luttakarin verður eftir ætlan komandi summar mamma at fyrsta Big Brother barninum í heiminum.

Í samrøðu við BT, sigur hon, at hon varð upp á vegin fyri seks vikum síðan. Sissal greiðir frá, at átta dagar áðrenn hon fór út úr Big Brother húsinum, gjørdist hon greið yvir, at hon var við barn.

Á heimasíðuni bigbrother.dk greiðir komandi pápin, Robert, frá, at tey fingu loyvi at tosa um barnið, uttan at tað varð bandað.

Eftir, at Sissal kom út úr Big Brother húsinum, hevur hon verið í skannara, og bæði hon og Robert hava sæð fostrið. Sissal er sett til at eiga 22. juli komandi summar.

Parið hevur ikki avgjørt, hvussu barnið skal eita, men verður tað ein drongur, so nevnir Sissal navnið, Oskar, sum ein møguleika.

## Aftur til veruleikan

Tað eru góðar tvær vikur síðan Sissal fór úr Big Brother. Sjálv sigur hon, at hon hevur havt nógvar positivar upplivingar, síðan hon kom út.

Seinasta sendingin á hesum sinni av Big Brother, verður hósdagin, tá vinnarin verður kosin. Fyri Sissal og Robert er Big Brother ævintýrið longu av, og tey eru farin at fyrireika seg til veruleikan uttanfyri Big Brother húsið.

Robert ætlar sær undir at lesa aftur. Hann er í gongd við IT-verkfrøði, sum hann eisini las, áðrenn hann fór í Big Brother húsið.

Sissal hevur ætlanir at taka nakrar staklærugreinir á HF, áðrenn hon ger av, hvat hon síðan ætlar at fáast við.

## Sissal og Robert til Føroya um vikuskiftið

**Big Brother parið, Sissal og Robert, fara at royna seg sum barrvørðar á Eclipse komandi vikuskiftið.**

FØROYA VITJAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Komandi vikuskiftið leggja Big Brother parið, Sissal og Robert, leiðina til Føroyar. Tey hava játtað at hjálpa til í barrini á dansistaðnum, Eclipse, bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Tað er ikki fyrstu ferð, at luttakarar frá reality sendingum í Danmark vitja í Føroyum. Undan Sissal og Robert, hava bæði luttakarar frá Big Brother og Barrini roynt seg sum barrvørðar á dansistøðum í Havn.

www.smyril-line.fo



Søkt verður eftir
**pakkhúsformanni og starvsfólki til pakkhús**

**Uppgávurnar hjá formanninum eru:**

- Hava gott samskifti og samstarv við leiðaran á terminalinum og farmadeildini.
- Viðlíkahald av útgerð
- Handfaring av farmi og útgerð
- Skjóta fráboðan í sambandi við skaða á farm og útgerð
- Dagføra starvsfólk í pakkhúsinum um virksemi sum er í gongd
- Tryggja trygga goymslu og úrskiljing av vandamiklum vørum
- Uppteljing av farmi







Umsøkjarin skal hava trukkkoyrikort.

Løn eftir avtalu.

Nærri fæst at vita um størvini við at seta seg í samband við Rólant Højsted á tlf. **34 59 76** ella **21 34 65.**

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi **í seinasta lagi 20.12.03.**

Umsóknir við møguligum prógvum/CV skulu sendast til:

**Smyril Line, Postboks 370,
FO-110 Tórshavn,
Ella við telduposti til
rolanth@smyril-line.fo**

J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

## Høvuðstíðindi hjá BT og Ekstrablaðnum

**Komandi barnið hjá Sissal og Robert er høvuðstíðindi bæði í BT og Ekstrablaðnum í dag. Føroyingurin, Fróði Holm Knudsen, sum arbeiðir á BT, sigur, at søgur um Big Brother verða ómetaliga nógv lisnar av dønum, og tað er óivað orsøkin til, at søgan um barnið hjá Sissal og Robert eru høvuðstíðindi í dag.**

BIG BROTHER
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Søgan um komandi barnið hjá Sissal og Robert er bæði høvuðssøga á internetsíðunum hjá bæði BT og Ekstrablaðnum í dag. Av øllum hendingunum í Danmark um vikuskiftið og ikki minst uttan fyri Danmark, hevur søgan um barnið hjá Sissal og Robert eftir øllum at døma størstan áhuga hjá lesarunum.

Tað er føroyingurin, Fróði Holm Knudsen, sum dagliga starvast á BT, sum hevur gjørt samrøðuna við Sissal og Robert, har tey fortelja um komandi barnið hjá teimum.

Fróði Holm Knudsen hevur fylgt Big Brother sendingunum í ár fyri BT, og vit hava spurt hann, hví søgan um barnið hjá Sissal og Robert er høvuðstíðindini hjá BT í dag.

### Stóran áhuga

– Tilfarð um Big Brother verður ótrúliga nógv lisið av okkara lesarum. Á BT-online(heimasíðan hjá BT, blðm), eru vanliga um 2. mió. lesarar, og hvørja ferð vit hava havt eina søgu um Big Brother, verður tann søgan lisin mest internetinum. Eg giti, at tað sama ger seg galdandi við pappírsblaðnum hjá BT, svarar Fróði Holm Knudsen

Hann vísir á, at tað altíð er ein hørð kapping á BT, um hvør søga verður høvuðssøga hjá blaðnum, og nógv fólk fara óivað at lesa søguna um Big Brother barnið hjá Sissal og Robert, og tí er søgan raðfest sum høvuðssøga hjá BT í dag.



# Panikkur í Fólkaflokkinum

**Miðvís forfylging kallar Fólkaflokkurin bókina »Skjót journalistin«, sum kemur út í næstum. Fólkafloksmenn vilja vera við, at Tjóðveldisflokkurin stendur aftanfyri, og at Sjónvarp Føroya roynir at undirgrava løgmann. Annar høvundurin vísir aftur, at Tjóðveldisflokkurin hevur nakað sum helst við bókina at gera**

POLITISK BÓK
*Ingi Rasmussen*
*ingi@ sosialurin.fo*




»Skjót journalistin« eitur bók um politikk og journalistikk, sum kemur í bókabúðirnar 1. desember. Tað er júst tað, sum Fólkaflokkurin hevur hug at gera, nú ábendingar eru um, at bókin hevur tyngjandi niðurstøður um sjálvan løgmann.

Tingmenn Fólkafloksins hava sent Tjóðveldisflokkinum bræv, har teir siga seg hava frætt um bók, sum er ávegis, ið hevur til endamáls at sverta Anfinn Kallsberg. Teir siga seg eisini hava frætt, at Tjóðveldisflokkurin eigur lut í hesi bókaútgávu.

»Bókin er sostatt framhald av tí miðvísu undirgraving, sum byrjaði við brævinum hjá Kjartani Hoydal úr London í 2001 um at sabotera løgmann. Hon helt fram, tá tjóðveldistingmaður í fjør summar leyp á løgmann og setti samgonguna í vanda,« stendur millum annað í brævinum, sum er undirskrivað av Óla Breckmann, formanni í tingbólki Fólkafloksins.

Sipað verður til, at Tórbjørn Jacobsen legði Anfinn Kallsberg undir ikki at kenna mun á mínum og tínum í sambandi við hansara fortíð sum bókhaldari á Frostvirkinum í Norðdepli. Í tíðindaskrivi um bókina avdúka høvundarnir Grækaris Djurhuus Magnussen og Øssur Winthereig, at tað málið er ein týðandi partur í bókini. »Skjót journalistin« vísir fyri fyrstu ferð, hvat veruliga fór fram á Frostvirkinum í Norðdepli tey árini, Anfinn Kallsberg var bókhaldari á virkinum, siga teir.

### Gamalt mál

Tað málið hevur javnan verið uppi og vent, og ivi hevur fleiri ferðir verið sáddur um leiklutin hjá Anfinn Kallsberg. Nú verða prógvini so løgd fram, skilst. Fólkaflokkurin roynir at vera fyrri og byrgja fyri. Farið verður eftir monnunum, ið hava skrivað.

Sagt verður, at sjónvarpsstjórin er limur í felagsskapinum »Hesuferð« og tí ein móttakari av loyniboðunum úr London at undirgrava politikk løgmans. Annar bókahøvundurin er í farloyvi sum tíðindaleiðari og hin virkandi tíðindaleiðari í SvF.

»Teir royna nú aftur við hesi bókaútgávu at niðra landsins politiska leiðara«, skriva fólkaflokstingmenn í brævinum til Tjóðveldisflokkin og seta Høgna Hoydal tveir spurningar.

– Hvønn leiklut hevur Tjóðveldisflokkurin í nevndu útgávu?

– Heldur Tjóðveldisflokkurin, sum umsitur mentamál og harvið SvF, tað vera sambæriligt við størvini hjá rithøvundunum í almenna sjónvarpinum at spilla umdømi løgmans?

### Skjóta journalistin

Tingmanning Fólkafloksins væntar, at Tjóðveldisflokkurin svarar greitt.

Tjóðveldisflokkurin eigur als ongan lut í hesari bókaútgávu, er annar høvundurin, Grækaris Djurhuus Magnussen skjótur at svara, tá vit vendu okkum til hansara. Hann hevur sæð brævið, sum er sent fjølmiðlunum. Og tað, sum stendur í brævinum, sigur honum ikki so lítið.

– Heitið á bókini er »Skjót journalistin«, og brævið mestsum prógvar innihaldið í bókini. Tá ið tú dittar tær at grava eitt sindur djypri, so fara valdsharrarnir eftir journalistunum heldur enn at viðgera málið. Í brævinum stendur millum reglurnar, at vit vilja av við løgmann, men tað er ikki so, sigur Grækaris D. Magnussen.

Tað er greitt, at bókin kemur til eina tyngjandi niðurstøðu um fortíðina hjá løgmanni, men Grækaris D. Magnusssen vil einki siga um, hvørt tað eigur at fáa avleiðingar.

– Tað haldi eg, at vit eiga at lata upp til lesaran av meta um. Tað koma nýggj ting fram, sum ikki samsvara við tað, sum áður er komið fram. Annað fari eg ikki at siga enn, sigur Grækaris D. Magnussen.

Hann er í løtuni tíðindaleiðari í Sjónvarpi Føroya, og tað er sjónvarpið, sum fær toyggið frá Fólkaflokkinum. Grækaris D. Magnusen vil kortini einki siga um ta støðuna í løtuni.

### Skipað forfylging

Óli Breckmann vil ikki vera við, at teir royna at skjóta journalistin. Hann heldur talan vera um eina skipaða forfylging av Fólkaflokkinum og serliga løgmanni, sum kemur týðiliga til sjóndar. Men hann viðgongur, at teir ikki kenna til innihaldið og tíansheldur, at løgmaður fer at standa í ringum ljósi.

– Vit ána ikki, hvat innihaldið er. Men vit hava hoyrt og forstaðið, og vit hava fingið fleiri ábendingar um síðstu vikurnar, at bókin kemur við eini lortaspann til løgmann. Vit ætla ikki at steðga bókini, og tað eigur mann heldur ikki at gera. Men vit vilja hava at vita, um SvF hevur nakað við hetta at gera, og um tað er sambærligt við fjølmiðlapolitikk og etiskar reglur, sigur Óli Breckmann.

Spurdur, hví teir ikki bíða við at viðgera innihaldið í bókini, til hon kemur út, svarar Óli Breckmann, at tá er ov seint.

– Tá verður so nógvur larmur og øsing, at vit fáa ikki eitt bein til jørðina, sigur hann.




Henda áttanda og seinasta bókin í røðini viðger bráða endan, sum føroyska virksemið í Grønlandi fekk.

Seinast í sekstiárunum var so kalt og so nógvur ísur í Grønlandi, at lítið var at fáa. Flestu skipini funnu sær aðrar leiðir, og útróðrarmenninir góvust at fara til Grønlands um summarið. Við hesum fór ein serlig vinna í søguna.

Um sama mundið fóru føroyingar undir nýggjar vinnur í Grønlandi. Fyrst varð farið at fiska laks við gørnum og síðan at trola eftir rækjum. Hetta virksemið eydnaðist og kastaði væl av sær, meðan vit enn høvdu rættindi undir Grønlandi. Tá ið Grønland fór upp í Felagsmarknaðin, broyttust okkara møguleikar, og nú vóru rættindi ikki longur eitt mál, ið kundi avgerast millum ríkispartarnar. Longu í 1970 varð umhugsað at steingja støðina í Føroyingahavnini, men hon andi kortini heilt til 1989, tá ið landskassin ikki longur vildi gjalda.

Hetta var formligi endin á einum sera týdningarmiklum skeiði í føroyskari vinnulívs- og samfelagssøgu.

**Jógvan Arge**

299,-

SANSIR 355 355

## Tíðindaleiðarin sagt seg úr starvi

**Annar av høvundunum til bókina »Skjót journalistin« hevur sagt seg úr starvi sum tíðindaleiðari á Sjónvarpi Føroya fyri ikki at skaða sjónvarpið**

POLITISK BÓK
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Bókin »Skjót journalistin« hevur kravt sítt fyrsta offur. Grækaris D. Magnussen, virkandi tíðindaleiðari á SvF, hevur sagt seg úr starvi sum tíðindaleiðari og heldur seg burtur, meðan bókin er heit millum almenningin.

Fólkaflokkurin leggur eftir sjónvarpinum fyri at standa aftan fyri bókina »Skjót journalistin«, ið millum annað viðger fortíðina hjá løgmanni. Rithøvundarnir hava báðir tilknýti til Sjónvarp Føroya. Øssur Winthereig er í farloyvi sum tíðindaleiðari í SvF og Grækaris D. Magnussen er tíðindaleiðari í hansara stað. Til klokkan 12 mánadagin.

– Eg havi biðið um at vera loystur úr starvi hjá sjónvarpinum. Eg vil sleppa sjónvarpinum undan vera sett í miskreditt og vóni, at bókin ikki førir til, at skotið verður eftir sjónvarpinum, sum als einki hevur við hana at gera, sigur Grækaris D. Magnussen.

Í fyrstu atløgu fer hann frá sum tíðindaleiðari, og hann hevur eisini sagt seg úr starvi á sjónvarpinum til 1. januar. Tá umhugsar hann støðuna av nýggjum, um hann aftur verður journalistur á sjónvarpinum.

Stjórin hevur tikið uppsøgnina til eftirtektar. Sjálvur viðgongur Grækaris D. Magnussen, at tað kann tykjast drastiskt, men hann hevur tikið avleiðingarnar av, at Fólkaflokkurin finst at honum og setir sjónvarpið í ringt ljós. So er spurningurin, um bókin »Skjót journalistin« fer at føra til, at fleiri leggja frá sær.